# Deyðasjúk ongan góðan

**Hetta er 3. partur og tann seinasti í greinarøðini, har Sosialurin viðger umstøðurnar hjá deyðasjúkum og varðandi sjúkum í Føroyum. Sum støðan er í løtuni, er tað ongin innan almanna- og heilsuverkið, sum burtur av tekur sær teimum, ið eru uppgivin av læknum og bert bíða eftir deyðanum. Við øðrum orðum hava tey deyðasjúku ongan góðan í heilsuskipanini**

Anna Maria Joensen, sum hevur skrivað hesa greinarøðina um viðurskiftini hjá deyðasjúkum, er 45 ár og ættað úr Havn. Í 1991 flutti hon til Danmarkar í lestrarørindum og kom heimaftur fyri sløkum tveimum árum síðani saman við manni og dóttur. Er útbúgvin innan úflutning í Herning og hevur starvast í bæði fiskivinnu og oljuvinnu. Seinni lisið norðurlendskar bókmentir og mentan á Lærda Háskúlaunum í Helsinki, har familjan búði í sløk fimm ár. Komin aftur til Danmarkar læs hon bókmentafrøði sum høvuðsgrein og minnilutabólkar sum síðugrein á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn. Anna Maria Joensen, ið sjálv hevur royndir sum avvarðandi, sigur, at endamálið við greinarøðini er breiða út vitan og kunnleika um støðu teirra deyðasjúku, varandi sjúku og teirra avvarðandi. Samstundis at vísa á, hvat aðalmálið í norðurlondum um heildarhugsan, heildarviðgerð og umsorgan miðar eftir. Palliativur (linnandi, men ikki lekjandi) hugburður og umsorgan, sum hevur ment seg innan krabbameinsøkið burturav, er tað besta heilsuverkið kann bjóða varandi sjúkum. Henda sokallaða holistiska (heildarspekiliga) tilgongdin setir menniskjað sjálvt í miðdepilin og átti at verðið framd í verki fyri øll varandi sjúk í Føroyum, heldur Anna Maria Joensen.



### Miðlahúsið viðger umstøður hjá deyðasjúkum

Mikukvøldið 11. apríl kl. 19, og IKKI 10. apríl, sum vit skrivaðu gjár, verður pallboðsfundur í Miðlahúsinum um umstøður teirra deyðasjúku og varandi sjúku í Føroyum. Øll eru vælkomin at líða á og seta spurningar til luttakararnar sum verða: Kathrina Lindenskov Joensen, sálarfrøðingur, Jákup N. Olsen, sjúklingaráðsformaður,

Mary J. í Garði, nærverkstjóri, Marin Vang, sjúkrarøktarfrøðingarstjóri á Landssjúkrahúsinum, Erik Wandall, yvirlækni og Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

# Doyggjandi mugu hava meiri pláss

**Landssjúkrahúsið roynir at tryggja nakrar av teimum góðu umstøðunum, ið hospice hugburðurin leggur upp til, sjálvt um onki hospice finst í Føroyum til sera sjúk og doyggjandi menniskju, sigur Marin Vang, ið er sjúkrarøktarfrøðingarstjóri á Landssjúkrahúsinum**



*Marin Vang er sjúkrarøktarfrøðingarstjóri og situr í trýmannaðu leiðsluni á Landssjúkrahúsinum. Hon var við í arbeiðsbólkinum sum gjørdi tilmæli um hospice funktión í Føroyum í 2001*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**DEYÐASJÚK**
*Anna Maria Joensen*
*amac@post.olivant.fo*

Tá Marin Vang, stjóri fyri sjúkrarøktarfrøðingarnar á Landssjúkrahúsinum, í 2001 luttók í arbeiðsbólki, sum var settur av landsstýrinum at gera tilmæli um hospice funktión í Føroyum, var tað út frá einum sjúklingaynski um betri kor til doyggjandi krabbameinssjúklingar. Vitandi um hvat rørdi seg í grannalondunum á palliativa umsorganarøkinum, átti tað eisini at borið til í Føroyum at givið virðilig kor til júst hesar hart raktu sjúklingar.

Varðandi sjúk ella doyggjandi hava brúk fyri tryggleika, og at karmarnir eru í lagi. Hesi menniskju hava nóg mikið at stríðast við frammanundan. Ikki minst tí tey ræðast alt tað, sum stendur fyri framman, eftir at hava fingið boð um álvarsligu sjúkuna. Nógvir krabbameinssjúklingar ynskja at vera heima hjá familjuni so nógv sum møguligt, og eisini eru tað tey sum ynskja at doyggja heima. Ymisku tilboðini innan palliativa umsorgan kunnu geva sjúklingum og teimum avvarðandi betri lívsdygd áðrenn deyðan, og kunnu eisini gera tað møguligt hjá sjúklingunum at vera í heiminum næstan alla tíðina.

Bara tað at kunna ganga pínufríur og uttan at hava vaml fyri mati ger, at ein kann hugna sær við familjuni og gloyma ringu støðuna, sum kroppurin er í. Eisini tað at onnur kenna til sjúkugongdina, fylgja við og samtala um trupuleikar ella møguleikar, er við til at geva tryggleika.

Í Danmark finnast hospice, har sjúk koma at vera seinastu tíðina ella koma fyri at styrkja seg. Eisini eru eindir inni á størri sjúkrahúsum, har pláss er til sjúklingar og avvarðandi familju eisini. Í øllum førum er serútbúgvið starvsfólk knýtt at palliativari viðgerð og umsorgan, sum veita heildarumsorgan. Tílík palliativ (linnandi viðgerð) toymi av læknum, sjúkrarøktarfrøðingum, sálarfrøðingum, kostráðgevum, fysioterpeutum, prestum og øðrum stuðla og menna lívsdygdina hjá tí sjúka og teirra avvarðandi, til deyðin kemur.

Marin Vang greiðir soleiðis frá fyrimunum við hospice.

- Í sjálvum sær er fyrimunurin soleiðis, at sjúklingurin hevur møguleika fyri at velja, hvussu seinasta tíðin skal verða. Møguliga saman við familjuni og undir tryggum umstøðum, og at sjúklingurin ikki endiliga verður innlagdur á sjúkrahús, uttan at ynskja tað, og har tað ikki er neyðugt. Á hospice er friðarligt og ikki so rokaligt, sum á eini vanligari somatiskari sjúkradeild. Avvarðandi fáa frið at vera saman við tí doyggjandi. Eisini sjúkrarøktarfrøðingarnir hava betri umstøður at útføra optimala sjúkrarøkt eitt tilíkt stað. Idealið er sjálvandi hospice, men vit arbeiða fyri at tryggja nakrar av umstøðunum í dag, sigur Marin Vang.

### Toymið er tóðnað

Líkamikið um tilmælið valdi hospice ella ikki, so hvílur allur heildarhugburðurin í palliatión á, at eitt fakligt toymi við tvørfakligari samanseting veitir palliativa umsorgan, viðgerð og frálæru, har brúk er fyri tí. Tað allar fyrsta føroyska palliativa toymið varð sett á stovn í 2005 og fekk 500.000 kr. árliga til allar útreiðslur.

- Vit settu ein tvørfakligan arbeiðsbólk at leggja arbeiðið tilrættis. Toymið varð sett saman av trimum læknum, tveimum sjúkrarøktarfrøðingum, einum psykologi, figgjarleiðara, lækna-